# Hvat skal BMS (Bóking millum stovnar) verða brúkt til ?

BMS skal bert verða brúkt til flytingar millum stovnar, sum ikki eru av realbúskaparligum slagi, t.e. flytingar á standardroknskaparkontu 7110 og 7610.

## Hvat er ikki ein ”realbúskaparlig flyting”?

Fyri at allýsa hvat ein ”ikki realbúskaparlig flyting” er, er lættast at lýsa, hvat ein realbúskaparlig flyting er: *Ein realbúskaparlig flyting er ein beinleiðis útreiðsla fyri løn, vøru, tænastu, løgu, almenna veiting og rentu*.

## Hvat er ein ”ikki realbúskaparlig flyting”

Vanliga er talan um eina ”ikki búskaparliga flyting”, tá ið pengarnir liggja í einum øðrum kassa, enn har útreiðslan verður hildin. T.d. felags tænastur, sum fleiri stovnar eru um, har tann eini stovnurin rindar útreiðsluna, og hinir stovnarnir endurrinda teirra part av útreiðsluni.

Talan kann ikki vera um at flyta játtan. At flyta játtan, kann bara Løgtingið gera.

Er talan um eina verkætlan, sum fleiri stovnar eru um, er tað stórur fyrimunur, at hava roknskapin fyri verkætlanina á einum stovnsnummari, meðan hinir stovnarnir rinda teirra part av verkætlanini við eini flyting.

## Hví skulu vit brúka kontusettið 7110 og 7610

Er tað ein veiting, sum fleiri stovnar eru felags um, er tað ein fyrimunur at bóka veitingina á eitt stovnsnummar og flyta partin hjá luttakandi stovnunum til stovnin, sum ber útreiðsluna. Roknskapurin verður reinari, tí tú sært samlaðu útreiðsluna á einum staði.

Er tað talan um t.d. at keypa ein bil, sum 3 stovnar eru felags um, gevur tað ikki meining at bóka bilin í 3 lutir. Í slíkum føri er rættast at halda allar útreiðslurnar til bilin á einum stovnsnummari, og hini bæði stovnsnumrini flyta teirra part við internum flytingum.

Er talan um stórar verkætlanir, har tað verða brúktir nógvir kontutættir t.d. nógvar útgreiningar, støð, endamál, verkætlanir og verkevni, ber tað snøgt sagt ikki til at liða útreiðsluna sundur á fleiri stovnsnummur.

Gjørdu vit hetta, høvdu vit mist nógvar upplýsingar og vitan, bókhaldið hevði verið órudduligt og møguleikin fyri feilum hevði verið stórur. Stýringin av verkætlanini hevði eisini verið ómetaliga torfør, tí hvat er tann rætti roknskapurin fyri verkætlanina.

Her kemur kontusettið 7110 og 7610 okkum til hjálpar.

## Dømi um flytingar millum stovnar

Her eru nøkur vanlig dømi, har flytingar millum stovnar verður brúkt, t.d. tá talan er um felags:

- servarar
- internetsamband

- húsaleigu
- hita
- tilfeingi t.d. útreiðslur til húsavørð
- rakstur av kantinu
- kt-menning

## Grundarlag fyri flytingini

Grundarlagið undir flytingini skal vera veruligar útreiðslur, sum liggja innanfyri ræðið hjá stovninum.

Vanliga liggur ein greið avtala sum grundarlag undir slíkum útreiðslum, áðrenn tær verða hildnar.

Talan kann eisini vera um, at ein stovnur hevur (partvís) skyldu at endurrinda, og ein annar partur hevur skyldu at veita tænastuna. Hetta síggja vit t.d. innan eldrarøkt, har kommunurnar flyta.